# TÍÐINDI

SAMBAND
KÁRI MIKKELSEN
KARIM@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Kava eftir fornminnum

**Føroya Fornminnis-savn og Faroe Diva hava skipa fyri fyrsta skeiðnum í marin-fornfrøði – har kavað verður eftir forn-minnum**

KAVING
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tað er í sambandi við, at áhugin fyri fornminnum í sjónum um oyggjar okkara er vaksin sera nógv seinastu tíðina, at Føroya Fornminnis-savn saman við Faroe Dive hevur skipað fyri fyrsta skeiðnum í marin-fornfrøði, ið hevur verið í Føroyum.

Undirvísari á skeiðnum var danski marinearkæolog-urin, Jørgen Dencker, frá Vikingeskibmuseet í Roskilde, ið er ein partur av danska Nationalmuseuminum.

Jørgen Dencker hevur arbeitt við marin-fornfrøði í meiri enn 30 ár og hevði nógv at læra luttakarinar.

Undirvíst var í teori fríggjadagin. Har serligu arbeiðshættirnir hjá marine-arkæologum vóru viðgjørdir. Leygardagin var farið norður til Hvalvíkar, har vrakið av Golden Harp liggur. Har vóru fleiri upp-mátingarhættir royndir, og næmingarnir fingu venjing í, hvussu slíkt arbeiði kann skipast, og hvussu tú arbeiðir á einum slíkum útgrevstri.

Sunnudagin vóru allar uppmátingarnar og vitanin, ið varð fingin til vega dagin fyri, teknað inn á skipanir, soleiðis at onnur kunnu fáa gleði av henni.

Eisini varð kavað niður á vrakið, ið kavarar halda verða Súluna. Hetta vrakið liggur undir Hulki á Skála-fjørðinum.

Allir næmingarnir á skeiðnum vóru sera glaðir fyri skeiðið og gleða seg at koma ígongd við at sam-starvið við Føroya Forn-minnissavn við skrásetingini av vrakum í Føroyum.

Lesi meira um sama evni á síðu 13.



*Kavarar, sum luttóku á skeiðinum fyri "forn-minniskavarar", sum Føroya Fornminnissavn og Faroe Dive skipaðu fyri í síðstu viku*



*Karl setir merkiseðlar á bondini á Golden Harp*



*Jørgen Dencker, sum er marine arkæologur, undirvísir við vrakið av Golden Harp í Streymnesi*




# Demokratia heldur fram

**Demokratia - nevndin fyri øktum kvinnuligum leikluti í politikki - er nú mannað av nýggjum**

JAVNSTØÐA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í nevndini eru eitt umboð fyri hvønn flokk á Løgtingi, eitt umboð fyri Føroya Kommunufelag, eitt umboð fyri Kommunusamskipan Føroya, eitt umboð fyri Kvinnufelagasamskipan Føroya og eitt umboð fyri Javnstøðunevndina. Varalimir verða valdir fyri allar limir. Nýggja nevndin skipar seg sjálv á fyrsta fundinum.

Tey, ið manna nevndina, eru: Oluffa Joensen, Mirjam Michelsen, Inga Dahl, Sólfríð Fjalsbak, Hans J. Hermansen, Annika Sølvará, Eyðun Christiansen, Steinbjørn O. Jacobsen og Kristianna Winther Poulsen.

Demokratia hevur felags skrivstovuhald við Javnstøðunevndina.

Nevndin hevur til uppgávu at skipa fyri tvør-politiskum tiltøkum til tess at fremja javnstøðu, har politiskar avgerðir verða tiknar.

- Ein fyritreyt fyri, at okkara land skal standa í heiminum í dag er, at vit brúka allar kreftir - tað samlaða tilfeingið - í fólkinum. Á løgtingsvalinum í januar sóu vit eitt heilt greitt úrslit av arbeiðinum hjá Demokratiu. Næsta avbjóðingin er kommunuvalið í heyst, og fari eg at ynskja Demokratiu góða eydnu við komandi átøkunum, sigur Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinna í javnstøðumálum.